*Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli*

Frúutrøð 1 · Postboks 353 · FO-100 Tórshavn · Tlf. 302472
Fax 302471 · kvoldskulin@torshavn.fo · www.kvoldskulin.fo

## Lærarar at undirvísa í Kvøldskúlanum komandi ár

Komandi skúlaár 2009/10 sóknast vit eftir lærarum at undirvísa í hesum lærugreinum:

- Kalligrafi, fagurskrift og skeltaskriving
- Urtagarðsrøkt
- Blómubinding
- Spanskt framhald
- Støddfrøði í 9. og 10. flokki
- Klaver
- Matgerð ( bæði vanlig matgerð og klænkiskeið)
- Ryggfimleikur
- Hjartafimleikur
- Tekning og máling í Kollafirði
- Allar lærugreinir í Kaldbak

Skeiðini kunnu vera ársskeið, ½ ársskeið ella styttri skeið sum t.d. vikuskiftisskeið.

Um tú kundi hugsað tær at undirvíst í aðrari lærugrein enn teimum, ið her eru nevndar, ert tú eisini vælkomin at spyrja teg fyri.

Hevur tú hug at frætta nærri, ert tú vælkomin at seta teg í samband við skúlaleiðaran Jákup P. Strøm á tlf. 217755 ella á telduposti jakups@torshavn.fo

*Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli*



## Húsini á Gásamýri 19 í Leirvík til sølu

Húsini eru í tveimum hæddum à 90 fermetrar, grundøkið 620 fermetrar. Stórur urtagarður, sum er býttur í trý øki við grótlaðing.

Húsini standa í friðarligum og barnavinarligum umhvørvi við sera góðum sólargangi allan dagin.

Húsini verða seld, um nøktandi boð verða givin.

**Meira fæst at vita við at ringja á tel. 214383.**

## Fólk til træsmiðjuna hjá ALV í Havn

Vit sóknast eftir einum starvsfólki til træsmiðjuna hjá Alv í Smiðjugerði.

Í framleiðsluvirkinum í Smiðjugerði eru 4 verkstøð umframt Tinghúsið á Hjalla. Dagliga starvast 20 næmingar og avlaminspensionistar, umframt 5 starvsfólk.

Endamálið við deildini er framleiðsla og menning. Alv er ein stovnur í støðugari menning

**Arbeiðsuppgávurnar hjá tær verða í høvuðsheitum**

- at hjálpa tí einstaka til at nýta sínar førleikar
- at finna egnaðar framleiðslur, sum passa til tann einstaka næmingin
- at hava um hendi framleiðsluna, har vit millum annað framleiða ringbind
- at gera træverkstaðin til eitt mennandi arbeiðspláss

**Vit síggja fyri okkum eitt fólk ið hevur**

- viðkomandi handverkara útbúgving
- evnir og hug at læra frá sær
- góð evnir at samstarva, eisini við aðrar fakbólkar og aðrar deildir av ALV.
- dugir/ur at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- er hugskotsfull/ur, kreativ/ur og jalig/ur
- er rúmlig/ur mótvegis tí frábregandi
- er opin fyri førleikamenning

**Vit kunnu bjóða tær**

- eitt spennandi arbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan
- eitt mennandi umhvørvi við góðum samstarvsfeløgum og goðum samstarvi
- persónligar avbjóðingar, ið geva persónliga menning
- at verða við til at menna Framleiðsluvirkið í Smiðjugerði
- talan kann har umframt verða um at arbeiða á deildum innan ALV. Sí heimasíðuna w.w.w Alv.fo

**Løn og setanartreytir**
Starvið hevur tilvísing til deildarleiðaran og verður at seta 17. aug. 2009.

Lønin verður javnlíknað við pedagogiska økið, smáir búðstovnar.

Meira fæst at vita um starvið, við at ringja á tlf. 350070. Spyr eftir Hannu Jacobsen, deildarleiðara.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 1.juli 2009.

Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m. skal sendast til alv@alv ella til:

Sjálvsognarstovurin ALV
Smiðjugerði 6. kj.
Postboks 301
110 Tórshavn
viðmerk: træsmiðjan

**Sosialurin**
www.sosialurin.fo

norden
NORÐURLANDAHÚSIÐ

## Skrivstovulærlingur

**Læruplássið**
Lærupláss sum skrivstovulærlingur innan fyrisiting, er leyst at søkja í Norðurlandahúsinum.

Umsóknin skal merkjast "Skrivstovunæmingur".

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjarin hevur lokið HH, HF, student- ella FHS- prógv . Tað er ein fyrimunur at hava góðan málkunnleika umframt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt og er áhugaður í mentanarligum virksemi.

**Setanar- og lønartreytir**
Viðkomandi verður settur eftir reglunum um skrivstovulærlingar í lønarsáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið/Yrkisdepilin. Ynskiligt er, at viðkomandi kann byrja 15. august 2009.

**Umsókn**
Umsóknin má verða Norðurlandahúsinum í hendi í seinasta lagi 1. juli 2009.

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
POSTBOKS 1260
110 TÓRSHAVN
Telefon + 317900
Telefax + 319790
e-mail:nlh@nlh.fo
http://www.nlh.fo

**Norðurlandahúsið** er stovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum og Føroya Landsstýri. Endamálið við Norðurlandahúsinum er at fáa norðurlendska mentan til Føroya , føroyska mentan til hini Norðurlondini og at hýsa føroyskum tiltøkum í Føroyum. Í 2008 vóru 295 tiltøk í Húsinum og uttanfyri Húsið. Umleið 60.000 fólk vitjaðu Húsið í 2008. Í Húsinum arbeiða 15 fólk

**FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ**

## FRÁ FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

Feløg og einstaklingar, sum hava ætlanir um at nýta fimleikarhøll skúlans vetrarhálvuna 2009-2010 verða biðin um at senda mentamálanevndini skrivliga umsókn í seinasta lagi fríggjadagin 03. juli 2009 kl. 15.00.

*Fuglafjørður, tann 15. juni 2009*

**FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ**
**MENTAMÁLANEVNDIN**